FaroeJet:

# Trygdin í hondunum hjá Malmø Aviation

**– Tað verður tekniski leiðarin hjá FaroeJet, Mourits Joensen, sum kemur at hava eftirlit við og ábyrgd av tí arbeiði, sum Malmø Aviation, fer at gera fyri okkum, sigur stjórin í FaroeJet, Jóhan Simonsen**

FLÚGVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggja føroyska flogfelagið, FaroeJet, hevur nú bæði fingið flogfar, manning og samstarvsfelag, sum saman við tekniska leiðaranum, Mouritsi Joensen, skal syrgja fyri, at trygdin er í lagi.

Jóhan Simonsen, stjóri í FaroeJet, sigur, at tað verður Malmø Aviation, sum kemur at taka sær av eftirlitinum og viðlíkahaldinum av flogfarinum

– Felagið, sum hevur verkstað í Kastrup, umsitir eini 10 flogfør av sama slagi, sum flogfarið hjá FaroeJet.

Hann vísir á, at tað verður tekniski leiðarin hjá FaroeJet, sum kemur at hava eftirlit við tí arbeiði, sum Malmø Aviation ger fyri felagið, og tað verður somuleiðis tekniski leiðarin, sum stendur við ábyrgdini.



*Enn vil stjórin í FaroeJet, Jóhan Simonsen, einki ítøkiligt siga um ferðaseðlaprísir og møgulig tilboð, men kunnað verður um hetta á tíðindafundi í næstum*

*Mynd: Øssur Mohr*

Flogleiðari hjá FaroeJet verður Hans Meinhard á Høgabóli, og saman við Mouritsi Joensen hava teir báðir drúgvar royndir á sínum øki.

### Langtíðarleiga

Jóhan Simonsen sigur, at felagið hevur langtíðarleigað flogfarið, BEA RJ100, frá írska felagnum, Trident Jet Leasing. Leigan gongur fyribils yvir 5 ár.

– 94 sitipláss verða í okkara flogfari, ið er av sama slagi og somu støð, sum nýggjasta flogfarið hjá Atlantsflogi. Vit fara at leggja stóran dent á, at tað verður gott pláss hjá ferðafólkunum at sita.

Stjórin vísir á, at hóast tvey flogfør eru eins og hava sama tal av sitiplássum, er ikki vist, at plássið hjá ferðafólkunum er tað sama.

– Hetta veldst um so nógv annað eisini, eitt nú hvussu nógv skáp og annað eru í flogfarinum. Vit ætla í hvussu er, at ferðafólk skulu hava gott pláss, sigur Jóhan.

### Skrivstovan

FaroeJet fer at selja sínar ferðaseðlar um ferðaskrivstovur og á alnetinum, og tí verður umsitingin hjá flogfelagnum ætlandi lítil.

Jóhan sigur, at felagið fer at hava skrivstovu á flogvøllinum í Vágum.

Í byrjanini verða tilsamans 24 fólk í fullum starvi hjá felagnum, harav seks flogskiparar og 10 flogternur.

– Her er talan um fulltíðarstørv, men talið av fólki er sjálvsagt størri, tí øll arbeiða ikki fulla tíð, sigur hann.

Enn vil stjórin í FaroeJet einki ítøkiligt siga um prísir og tilboð, tí kunnað verður um hetta á tíðindafundi, sum verður í næstum, helst annan mánadag.

### Lægri prísir

– Nógv verður øðrvísi hjá okkum enn hjá Atlantsflogi, og kappingin fer heilt vist at lække ferðaseðlaprísirnar. Tilboðini hjá okkum verða einfaldari, og eisini verða færri prísklassar. Men vit fara eisini at hava bílig tilboð, og kappingin fer at lække ferðaseðlaprísirnar, tí samlaða útboðið av tilboðum verður størri, segði nevndarformaðurin í felagnum, Knút Lutzen, við útvarpið fyri nøkrum vikum síðan.

FaroeJet fer sum kunnugt ikki at skonkja ókeypis á sínum ferðum.

### Fleiri íleggjarar

Jóhan Simonsen sigur, at støðan í løtuni er hon, at út við 400 íleggjarar eru í nýggja felagnum, og samlaði partapeningurin nærkast nú 25 mió krónum.

– Vit hava lýst okkara ferðaætlan, har flogið verður tvær ferðir um dagin um summarið og eina ferð um dagin um veturin – og vit miðja framvegis eftir, at flogið verður fyrstu ferð, 1. mai, sigur stjórin at enda.

# Daprar yvirlitstrolingar eftir toski og upsa

**Magnus Heinason hevur gjørt tær fyrru yvirlitstrolingarnar í ár. Úrslitið vísir, at veiðan sum heild hevur verið vánalig, serliga veiðan av toski og upsa**

YVIRLITSTROLINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tann fyrri yvirlitstúrurin hjá Magnusi Heinasyni á landgrunninum í vár er av. Túrurin vardi frá 22. februar til 8. mars, og Petur Steingrund, fiskifrøðingur, var toktleiðari á veiðiferðini.

Hann sigur, at sum heild var lítið at fáa av nærum øllum fiskasløgum samanborið við somu tíð í fjør.

### Lítil toskaveiða

– Toskaveiðan var bert umleið ein triðingur av nøgdini í fjør, og veiðan av upsa var lutfalsliga lítið frægari enn við toskinum.

Hann vísir eitt nú á, at samlaða toskaveiðan í ár var 5,8 tons í mun til 20 tons um somu tíð í fjør

– Endaligu úrslitini fyri landgrunnin kunnu síggjast, tá ið úrslitini fyri seinna yvirlitstúrin eru tøk, sigur fiskifrøðingurin.

Petur sigur, at sera lítið var eisini at fáa av hvítingsbróðri og svartkjafti, sum vanliga er høvuðsføðin hjá toski og upsa á ytru leiðunum.

Hann sigur, at hýsuveiðan á hesum túrinum tó var á eini leið í mun til fyrru yvirlitstrolingarnar seinasta ár.

### Magakanningar

Magakanningarnar vístu, at lítið var til av nebbasild, men kortini var toskurin væl fyri, eins og hann eisini var væl fyri um hesa tíðina í fjør.

– Tað var týðiligt, at føðin á djúpum vatni, eitt nú hvítingsbróður og svartkjaftur, sveik fullkomiliga, sigur fiskifrøðingurin.

Høvuðsendamálið við yvirlitstrolingunum er at fáa til vega tilfar, sum skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, upsa og hýsu.

– Veðrið var sum heild vánaligt á túrinum, nógvur vindur av norði og landnyrðingi, sigur Petur Steingrund.



*– Veðrið var sum heild vánaligt á túrinum, sigur Petur Steingrund, fiskifrøðingur*

*Mynd: Rógvi Mouritsen*

## Nógv hava vitjað Mikines

Sum liður í hátíðarhaldinum fyri 100 ára føðingardagin hjá Sámal Joensen-Mikines, hevur Listasavn Føroya seinastu tveir mánaðirnar havt stóra framsýning við verkum eftir kenda listamanninum.

Í tíðindaskrivi sigur leiðarin fyri Listasavnið, at talið av vitjandi til framsýningina nú hevur sett met. Eini 5.000 fólk hava higartil vitjað framsýningina, og grundað á stóra áhugan er gjørt av, at framsýningin er longd við trimum vikum. Soleiðis fáa áhugað fram til 2. apríl høvi at síggja áhugaverdu framsýningina.

**-mørk**

## Televarpið yvirskot í 2005

TÍÐINDASKRIV

Televarpið hevur havt nevndarfund í dag, har roknskapurin fyri 2005 varð lagdur fram og góðkendur.

Úrslitið í 2005 varð kr. 732.000 eftir skatt, og er hetta ein vøkstur á kr. 2,5 mió í mun til 2004.

Nettosølan er hækkað við 32 % úr kr. 10,2 mió. í 2004 til kr. 15 mió. Televarpið hevði við árslok 5.206 haldarar, ið er ein øking uppá 21 %.

Nevnd og stjórn er nøgd við úrslitið. Úrslitið vísir, at Televarpið eftir minni enn trimum árum hevur rokkið málsetningarnar um eitt positivt roknskaparúrslit fyri felagið. Stóra framgongdin er grundað á vaksandi haldaratilgongd, skynsama kostnaðarstýring og effektiva umsiting. Í Televarpinum starvast trý fólk.

Útlitini fyri 2006 eru góð. Miðað verður eftir enn betri úrsliti fyri roknskapin í 2006 og einari haldaratilgongd á uml. 20 %. Televarpið ætlar at gera munandi íløgur í útbygging av sendinetinum m.a. vestur í Vágar, partar av Sandoynni og Suðuroynni. Í dag røkkur digitala sendinetið hjá Televarpinum uml. 76% av føroysku húsarhaldunum. Við ársskiftið 2006/7 er ætlanin at røkka uml. 85 %.